# Minni arbeiðsloysi í Íslandi



Seinasta mánaðarskiftið var arbeiðsloysið í Íslandi 7,7 prosent, og tað merkir, at 13.387 íslendingar vóru arbeiðsleysir í síðsta mánað, og av teimum vóru 12.526 fulltíðararbeiðsleys, skrivar Morgunblaðið. Samanborið við juli minkaði arbeiðsloysið 2,7 prosentstig í august, og tað merkir, at tey arbeiðsleysu vóru 369 færri. Men samanborið við august í fjør er arbeiðsloysið stórt, tí tá var arbeiðsloysið 1,2 prosent, sum svaraði til, at 2.136 fólk høvdu einki arbeiði. Tey nýggju tølini vísa, at arbeiðsloysið er størst á Reykjavíkarleiðini ella oman fyri 11 prosent.

# Nýgggja brúgv um Oyrasund

Ein nýggj frágreiðing mælir donskum og svenskum politikarum til at savna pening til at gera eina brúgv afturat um Oyrasund. Sambært frágreiðingini skulu danir og sviar brúka minst 50 milliardir krónur til samferðsluna, og millum íløgurnar er fast samband millum Helsingør og Helsingborg og nýggir motorvegir á Sælandi og í Skåne. Í frágreiðingini verður sagt, at verandi samband um Oyrasund fer ikki at nøkta tørvin í framtíðini. Sagt verður, at í dag ferðast fleiri fólk um Oyrasund enn um Stórabelti, og at munurin verður uppaftur størri um 10 ár.



*Kitty May Ellefsen og Rani Nolsøe eru hetta vikuskiftið á íverksetaramessu í Danmark. Tey hava góðar vónir um, at tað ber til at fáa útlendskan íverksetarakapital til Føroya*

*Mynd: Rógvi Nybo*

# Draga útlendskan kapital til føroyska íverksetan

**Umboð fyri Íverksetarahúsið eru nú farin undir eina roynd at fáa váðafúsan íverksetarakapital til Føroya. – Hugskotini eru her, men í Føroyum er eingin kapitalur at fáa til íverksetarar. Tí royna vit hesa leiðina, siga Rani Nolsøe og Kitty May Ellefsen, sum í dag eru farin á messu í Danmark**

ÍVERKSETAN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Størsti trupulleikin hjá føroyskum íverksetarum er manglandi kapitalur. Hetta er ein trupulleiki, sum íverksetarar dag og dagliga renna seg í.

- Bankarnir í Føroyum eru lítið váðafúsir, og eru trekir at seta pening í verkætlanir hjá íverksetarum. Úr teimum grunnum, sum eru, eru líkindini heldur ikki stór at fáa nakran pening. Tí hava vit, nú vit fara til Danmarkar á hesa íverksetaramessuna, fingið avtalað fund við nøkur fólk og nakrar grunnar, ið eru áhugaði í at seta kapital í ætlanir hjá íverksetarum í Norðurlondum, sigur Rani Nolsøe, ið saman við Kitty May Ellefsen er farin á íverksetaramessuna í Danmark.

Millum annað fara tey á fund við sokallaðar »Business Angels«. Ein »Business Angel« er ein íverksetari, sum hevur bygt seg upp og eru komnir til pengar, og sum so hava hug at geva víðari og seta pening í íverksetan. Eisini hava tey bæði í dag ein fund við ein tann størsta íverksetaragrunnin í Norðurlondum, North Zone.

- Tað hevði verið ótrúliga gott, um vit høvdu fingið North Zone at virkað í Føroyum eisini. Hetta, sum vit eru í gongd við nú, er bara innleiðandi. Tað næsta stigið verður at fáa eina avtalu í lag, greiðir Rani Nolsøe frá.

Á fundunum fara tey eitt nú at vísa á fleiri ítøkiligar ætlanir, sum føroyskir íverksetarar hava tikið stig til, og sum eru meir ella minni klárar at fara í gongd við, og sum eru patenteraðar.

### Skapar arbeiði

Sambært Rana Nolsøe og Kitty May Ellefsen eru tað trý umráðandi punkt, ið gera, at føroyingar ikki veruliga koma í gongd við teirra ætlanum.

- Tað eru trý ting, sum mangla. Vit mangla kapital, ein íverksetarapakka og ein yvirskipaðan íverksetarapolitikk. Í øllum okkara grannalondum hava tey ein heilan íverksetarapakka, men her hava vit so at siga einki, greiðir Kitty May Ellefsen frá.

- Tað vísir seg eisini, at av øllum teimum nýggju størvunum í til dømis Danmark, eru 50 prosent av teimum skapt av íverksetarum. Tað er júst sum við einum ítróttarfelag. Tú arbeiðir langsiktað og satsar upp á talent og útvikling. Um tú ikki hevur eina miðvísa ætlan, fær tú kanska onkuntíð eitt gott lið, og so fer alt í sor aftur. Tú má inn at satsa upp á íverksetan og at skapa íverksetarar, vísir Rani Nolsøe á.

Eitt annað, ið tey í ferðalagnum eisini fara at leggja dent á, er kvinnuligar íverksetarar.

– Tað er sera sjáldan, at kvinnur stovna nýggjar fyritøkur og tað vísir seg at tær eisini hava ringt við at vaksa. Vit fara á fund við Women&Business og Foreningen for kvindelige iværksættere, og fara at royna at skapa eitt netverk, soleiðis at vit kunnu stuðla uppundir at fáa fleiri kvinnuligar íverksetarar, sigur Rani Nolsøe.

Kitty May Ellefsen og Rani Nolsøe umboða Íverksetarahúsið í Klaksvík á ferðini, og tey eru farin á íverksetaramessuna »Iværk 09«, sum er í Danmark hetta vikuskiftið. Tey verða aftur leygardagin.

# Høgni Mohr gevst í Útvarpinum

**Ein kend útvarpsrødd er á veg úr Sortudýki. Høgni Mohr, sum veruliga hevur verið í andglettinum í seinastuni, gevst. - Men tað er ikki orsakaða av málinum um Elin Heinesen, sigur hann**

UPPSØGN
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Er hann nevndur, er hann kendur. Hóast hann bert hevur verið gott ár í Kringvarp Føroya, hevur vágbingurin Høgni Mohr veruliga sett sítt fingramerki á tíðindaflutningin í útvarpinum hjá Kringvarp Føroya.

Við eyðkenda máli sínum hevur hann dúliga borði fram smá sum stór tíðindi seinasta árið.

Í seinastuni hevur Høgni Mohr veruliga verið í andglettinum við málinum um Vinnuframagrunnin og fyrrverandi stjóranum í Samvit, Elin Heinesen. Funnist hevur verið at mátanum, sum tíðindini eru borin.

- Men tað er ikki tí, eg gevist. Tað er ein góður mánaði síðani eg boðaði frá, at eg gevist á nýggjárinum. So tað er ikki orsakað av hesum einstaka málinum, at eg gevist, greiðir Høgni Mohr frá.

Sjálvur greiðir hann tó eisini frá, at tað í seinastuni hevur ligið eitt stórt trýst á honum, og framvegis liggur tað, í samband við áðurnevnda málið.

- Men eg kann leggja afturat, at hetta er eitt mál, sum eg havi fingið tillutað við ein redaktiónsfund, og at øll tíðindini hava verið umvegis redaktørin og tíðindaleiðaran, áðrenn tey eru varpaði út, sigur Høgni Mohr.

Tá Høgni Mohr gevst í útvarpinum, ætlar hann sær fyrst og fremst út í heim at ferðast saman við familjuni, og so ætlar hann sær aftur í gongd við at skriva, sum hann eisini hevur gjørt áður, eitt nú fyri Sosialin.

- Eg haldi sjálvur at eg egni meg betri til tað, og fari at gera ymiskt arbeiði við at skriva fyri fólk, til heimasíður og ymiskt annað, greiðir Høgni Mohr frá.

Høgni Mohr gevst í útvarpinum 31.desember í ár.



*Eftir at hava verið í útvarpinum í gott eitt ár, hevur Høgni Mohr nú valt at gevast sum útvarpsmaður í Kringvarp Føroya á nýggjárinum. – Eg haldi sjálvur, at tað passar betri til mín at skriva, og tí havi eg valt at gevast, sigur Høgni Mohr*

*savnsmynd*